# Skrúðgonga í vánaligum veðri

ÓLAVSØKA
*Dagfinn Olsen*

Ólavsøkudag eru løgtingsmenn, landsstýrismenn, prestar og embætisfólk í kirkju. Skrúðgonga er úr og í Dómkirkjuna. Tingið verður sett og løgmansrøða er á skránni.

Í ár var henda hátíðarløta merkt av, at veðrið var heldur vánaligt. Ikki vóru mong kring tinghúsvøllin, tá sangurin var har og ein av nýggju ólavsøkukantatunum var framførd og tey flestu mundu uppliva hetta og skrúðgonguna á sjónvarpsrútinum.

Hans Eiler Hammer, prestur, helt ólavsøkuprædikuna. Vanliga eru mong og hyggja at skrúðgongunii og í kirkju. Men bæði innan og uttan kirkjugátt tyktist heldur fáment.

Veðrið var heldur vánaligt og tey vóru mong, ið bóru ótta fyri, at stóra flaggstongin á Tinghúsvøllinum skuldi brotna, sum hon gav seg undan nógva vindinum, meðan ólavsøkukantatan var framførd.

Óivað kom væl við hjá teimum, ið gingu skrúðgongu, at sleppa inn og at fáa ein góðan bita. Vanligt er, at bispur bjóðar prestunum ein betri bita eftir hátíðarløtuna. Og hóast tingformaðurin í ár gjørdi av, at bert virkandi prestar skuldu ganga skrúðgongu, og teir eldru sostatt ikki taldust í hesum skara, so vóru teir eldru, fráfarnu prestarnir bodnir við til døgurða hjá bispi.

Løgtingsmenn og landsstýrismenn fáa eisini vanliga ein betri bita. Løgtingsformaðurin hevði í ár gjørt av at bjóða teimum heim til hús.

Ólavsøkudagur var merktur av veðrinum og ikki fyrr enn eftir miðnátt og sangurin á vaglinum ljómaði, blíðkaði aftur.



*Veðrið var heldur vánaligt ólavsøkudag og ikki vóru tey mong, ið hættaðu sær út at hyggja at skrúðgonguni*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Sigl oyggj fram úr mjørka



*Útsýnið av Hovsegg hetta kvøld var sum úr vindeyganum á einum flogfari. Skýggj undir og klárur himmal yvir. Luftin reyð og upp úr mjørkanum hevjaði Lítla Dímun seg*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

**Skaldið Christian Matras hugleiddi og yrkti so hegnisliga: Sigl oyggj fram úr mjørka, nú ert tú eitt skip. Dygd yrkjarans er oftast júst at seta orð á hetta, ið liggur opið fyri okkum øllum, men sum ikki sæst í gerandismjørkanum, uttan eitt sindur av umhugsni**

NÁTTÚRA
*Dagfinn Olsen*

Leitar ein sær útum bøgarðarnar, uttan mun til, hvar ein annars er staddur, so er ber til at ognast vakrar náttúruupplivingar, hóast veðrið ikki ber boð um tað niðri í myrka túninum

Tikið verður til, at skógurin sæst ikki fyri trøum. Ofta síggja vit ikki tað vakra, ið land okkara hevur at bjóða, tí vit eru ov vánaligir eygleiðarar.

Ferðafólk við Smyrli til Suðuroyar hóskvøldið høvdu tó náttúrligar orsøkir til einki vakurt at hóma við oyggjum okkara.

Mjørkin lá nevniliga tjúkkur, so ikki sást fram um stavn.

Komin í land, kundi ein trilva seg fram eftir heldur smølu vegunum í Suðuroynni.

Men komin niðan á, lætti. Tá sást, at talan var um pállamjørka. Har niðri í mjørkanum høvdu vit ferðandi siglt. Útsýnið av Hovsegg hetta kvøld var sum úr vindeyganum á einum flogfari. Skýggj undir og klárur himmal yvir.

Ein vøkur sjón. Luftin reyð og upp úr mjørkanum hevjaði Lítla Dímun seg.

Niðri í mjørkanum var trupult at ímynda sær, at omanfyri var henda vakra sjón. Men Føroyar eru vakrar, um enn vit ikki altíð eru til reiðar at viðganga hetta, tá mjørkin fjalir.

Ofta verður tikið til og yrkt um eydnuna og alt tað vakra, ið er her heima og sum einum ikki nýtist at leita út í heim eftir. Og hetta er vert at hugsa um og leggja sær í geyma.

Tummar M. Smith sigur so væl í sanginum Nánd:

*Tann eydnan, tú hómar um blánandi fjøll,*
*hvør sigur hon finst ei í heimahøll ?*
*Tú átti ei friðleysur leita so fjart,*
*men lært teg at elska tað, sum tú sært*








# Stak friðarlig ólavsøka

**Gott veður er oftast løgregluni ein lætti um ólavsøkuna. Í ár gjørdist serliga seinni helmingur av ólavsøkuni ófantaligur, men løgreglan hevur kortini havt eina friðarliga ólavsøku**

ÓLAVSØKA
*Dagfinn Olsen*

Á politistøðini í Havn siga tey, at tey har hava havt eina stak friðarliga ólavsøku.

- Tað hava ikki nógv fólk sovið inni á støðini, segði vakthavandi, tá vit fregnaðust í gjár.

Neyvu tølini vóru ikki til taks, men náttina til mánadagin høvdu bert tveir sovið rúsin av á støðini.

Veðrið gjørdist gott út á leygardagin, men sunnudagurin var vátur við nógvum vindi. Tá náttin kom, gjørdist tó heldur blíðari og tá mánamorgunin kom, var rættuliga gott veður. Hesum nutu tey mongu gott av, ið framvegis hildu ólavsøku, tá gerandisdagurin kom mánamorgunin.

- Veðrið bleiv gott seinni í nátt og hevur hildið sær, segði vakthavandi mánamorgunin.

## Fløskur og gløs

Einki tiltak var, sambært løgregluni, ið kravdi serlig átøk frá løgregluni, ið annars var væl mannað um ólavsøkuna.

Fríggjakvøldið var ólavsøkukonsertin. Tá savnast nógv fólk. Mong eru nýbyrjarar, tá tað snýr seg um ólavsøkuhald, og hetta merkir nøkur teirra.

Tó gekk alt væl, sigur løgreglan, men viðmerkir samstundis, at nakað av trupulleikum var av fløskum og brotnum glasi.

Onkur datt og tá var óheppið við mongu glaspettunum.

Men sum heild ein stak friðarlig ólavsøka, staðfestir løgreglan.



*Løgreglan hevði eina friðarliga ólavsøku*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Løgmansrøða við biti í

**Løgmaður nýtti í seinastu løgmansrøðu síni hetta valskeiðið høvið at fílast á eftirlønarskipanina fyri landstýrismenn og at leggja eftir donsku stjórnini í hørðum vendingum fyri síðan at koma við einari langari og ikki so hvassari frágreiðing um hví einki bleiv av fráboðaðu fólkaatkvøðuni í mei**

LØGMANSRØÐA
*Rúnar Reistrup*

Sjálvstýrismál hava fylt nógv á dagsskránni hjá sitandi landsstýri, og hetta sást aftur í røðuni hjá løgmanni ólavsøkudag, har sjálvstýrismál fingu nógv orð við á vegnum.

Tað var eisini í hesum partinum av røðuni, at løgmaður feldi tey hvassastu orðini og kom við teirri longstu frágreiðingini.

Løgmaður segði um donsku stjórnina, at hon ger fullveldistilgongdina so trupla sum gjørligt, og at hon leggur allar hugsandi løgfrøðiligar og politiskar fótonglar, sum hann orðaði seg.

Tann parturin av løgmansrøðuni, ið snúi seg um sjálvstýrismál, byrjaði annars við einari gjøgnumgongd av sjálvstýrisgongdini, sum hon hevur verið, síðan Føroya Landsstýri sleit samráðingarnar við donsku stjórnina 26. oktober 2000.

## Grundgav fyri avlýsingini

Her nýtti løgmaður eisini høvi at geva Føroya fólki eina frágreiðing um, hví tann fráboðaða fólkaatkvøðan um sjálvstýri ongantíð gjørdist til nakað.

Grundgevingin, sum løgmaður førdi fram í røðu síni, fyri at avlýsa fólkaatkvøðuna var, at hann ikki vildi vera við til at innlima Føroyar í danska ríkið.

Løgmaður segði, at »av tí at danska stjórnin tulkaði fólkaatkvøðuna, sum eina endaliga atkvøðu um fult sjálvstýrið her og nú, um føroyingar atkvøddu ja, og eina innliman í danska ríkið, um føroyingar atkvøddu nei«, varð fólkaatkvøðan avlýst.

Hetta var egna grundgeving løgmanns, og hann kom ikki inn á tað álvarsligu ósemju, sum var í landsstýrinum um avlýstu fólkaatkvøðuna.

## Tunnil undir Leirvíksfjørð

Annars nýtti løgmaður høvið at finnast at samtyktu eftirlønarskipanini fyri landsstýrismenn og segði seg hava tikið stig til at »hesi viðurskiftini aftur koma í rættlag«.

Líkt er eisini til at løgmaður eisini brúkti røðuna sum høvi at seta tann í løtuni nógv umtalaða undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð longur fram á dagsskránna. Í innleiðandi partinum av røðuni segði løgmaður: »fyrireikingar eru byrjaðar til ein tunnil undir Leirvíksfjørð«. Higartil hevur bert verið tosað um at kanna umstøðurnar, men orðing løgmanns bar brá av meira.

Hendan løgmansrøðan var tann seinasta hjá Anfinni Kallsberg, løgmanni, hetta valskeið.

# Løgmansrøðan útskeldað í Ekstra Bladet

Ekstra Bladet hevur orð á sær um at siga tingini soleiðis sum tey eru og oftani verður rópt rættiliga hart um tingini. Í oddagreinini hjá Ekstra Bladet mánadagin fær løgmansrøðan av at vita.

- DERFOR KAN MAN blive noget så træt, når man hører Anfinn Kallsberg fornærmet udtale, at Danmark ikke vil samarbejde og i øvrigt blander sig for meget i færøske anliggender, verður sagt í oddagreinini eftir at greini hevur viðgjørt ríkisrættarligu sjónarmiðini hjá løgmanni í røðuni.

Oddagreinin vísir tó eitt sindur av vælvilja yvirfyri løgmanni, men sum heild er talan um rættiliga negativan tóna, har eingir fingrar verða lagdir ímillum.

Ekstra Bladet sær sjónarmiðini hjá løgmanni sum gleðilig fyri danska skattgjaldaran, og oddagreinin heldur tað ikki vera lítið løgið av løgmanni, at biða um at fáa blokkin skerdan komandi tíðina.

Oddagreinin ber eisini tað sjónarmið fram, at so leingi tað er eitt peningaligt samstarv millum Føroyar og Danmark, so vilja danir altíð blandað seg uppí, sum tikið verður til.

**hr**

# 100 ára føðingardagur

**Mikudagin 1. august 2001 verður**
**Malla Reynbú í Funningi 100 ár**

Dagurin verður hildin soleiðis:
Kl. 10.00 Móttøka fyri almennum persónum og familju í Korndalsbýlinum á Eiði.
Kl. 12.00 Døgurði fyri innbodnum á Hotel Eiði
Kl. 16.00–18.00 Malla verður at hitta í Korndalsbýlinum
Kl. 16.00–19.00 Opið hús í skúlanum í Funningi

*Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Funnings Kommuna**
**&**
**Korndalsbýlið**